


Vika 9, 2007

# PGS áhugavert

MARKNAÐARRÁK

Hóast seinasti ársfjórðingur í 2006 hjá Petroleum Geo Service (PGS) gjørdist verri enn Kaupthing metti, so eru nógv góð tekin í roknskaparkunngerðini. Eftirspurningurin eftir seismikki sær framvegis sterkur út og eingi tekin eru um, at nakað hæddarpunkt í prísinum er rokkið. Orsakað av stóra eftirspurninginum eru ordrabøkurnar hjá flestu kappingarneytunum hjá PGS fullar langt fram í tíðina. PGS hevur havt dirvið til ikki at bundið seg ov nógv. Tey kunnu tí gera sær dælt av støðuni og fáa hægri prís fyri tænastuna. Kaupthing metir tí at PGS kann fara at hækkað í virði komandi tíðina. Um partabrøv fara at lækka eitt sindur, kunnu íleggjarar nýta lækkingina sum eitt høvi at keypa PGS.

## Norska krónan hækkar við oljuprísinum

Norska krónan er styrknað 4% seinasta mánaðin, og hon kostar nú um 0,926 danskar krónur. Tað eru tvey áhugaverd viðurskifti, sum kunnu elva til, at hon fer at styrkna enn meir komandi tíðina. Eitt er, at hon fylgir rættiliga neyvt gongdini oljuprísinum. Um støðan í Iran gerst enn spentari, kann oljuprísurin hækka enn meir. Haraftrat er tað langt síðan, norska krónan hevur megnað at komið upp um 0,92, og hetta kann fáa íleggjarar at gerast meiri positivar um norsku krónuna.

## Lánsbrævarentur farnar at lækka

Hesa farnu vikuna er danska 10-ára rentan lækkað 0,10%-stig til 3,97%. Hetta hendir eftir ein mánaða við stórt sæð óbroyttum rentum. Hervið hava lánsbrævaeigarar fingið kursvinning, og útlit eru fyri, at langa rentan fer at lækka nakað aftrat.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður væntandi hendingarík á marknaðunum. Spenta støðan í Iran ger sítt til at flyta marknaðirnar. Iran er í ferð við at byggja sín fyrsta kjarnorkureaktor, og hevur sett pening av til at byggja fleiri aftrat. Um atfinngingarnar úr USA gerast harðari, kann hetta fáa partabrøv og rentur at lækka.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 565,12 | -0,3% |
| JPY | 4,68 | -1,2% |
| GBP | 1.109,66 | 0,3% |
| NOK | 92,59 | -0,1% |
| SEK | 80,41 | -0,4% |

Virðisbrøv

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,32 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 133,41 | 0,2% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 616,50 | 0,7% |
| KB Trygg Eurostoxx | 109,20 | 0,0% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

EL-SERVICE
FO-480 Skála · Faroe Islands · www.el-service.fo
Tlf. 47 19 00 · Fax. 47 19 01 · el-service@el-service.fo

Elektrikkarar

Vit sóknast eftir elektrikkarum til arbeiði í Føroyum, sum kunnu byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:
- el-innleggingar umborð á skipum
- el-innleggingar í bygningar á landi
- talvur
- stýringar
- o.a.

Vit vænta at tú hevur:
- úbúgvin sum elektrikkari
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Tú kann rokna við at skula arbeiða uttanlands í styttri tíðarskeið.

Løn sambært avtalu.

Áhugaði kunnu venda seg til El-Service á telefon 47 19 00.

Á El-Service arbeiða uml. 40 fólk, tey flestu hava el- og maskinútbúgving. Vit arbeiða við framleiðslu, innstallatión, eldsløkkiútgerð og offshore.

Størsti parturin av okkara veitanum og framleiðslu fer til útflutnings.

Vit leggja stóran dent á góðsku og eru ISO-9001 góðkent.



Skræddaraseyma tygara baðirúm



Øll hava rætt til eitt feitt baðirúm

kvik

Kvik Køkssentrið
Hoyvíksvegur 65
100 Tórshavn
Tlf. 31 24 80
Far. 51 24 80